Eingin landbúnaðarpolitikkur førdur meðan fólkaflokkurin hevur umsitið búnaðarmál



Fá skulu valda og njóta restin gjalda og tróta

— Tað er als eingin landbúnaðarpolitikkur førdur, øll tey mongu árini fólkafloksmenn hava umsitið landbúnaðin.

Hetta sigur ein av undangongumonnunum innan føroysk jarðarbrúk, Jákup Eidesgaard, sum hevur gjørt væleydnaðar royndir við at velta úr nýggjum uppi undir Slættaratindi.

Jákup Eidesgaard grundar sjónarmið sítt á, at møguleikarnir hjá teimum, sum fáast við m.a. at framleiða mjólk, eru munandi versnaðir.

— Bert hesi seinastu trý til fýra árini eru inntøkumøguleikarnir hjá jarðarbrúkarunum versnaðir við millum 40 til 50% í mun til aðrar lønarstættir.

Haraftrat kemur, at nú hava bóndirnir roknskapsskyldu. Sambært hesa skulu teir nú gjalda í minsta lagi 1000 kr. í skatti fyri hvørja mjólkikúgv.

— Eg skal tí gjalda 7000 kr. í skatti — og eg fái onga kompensatión í studningi fyri ta rokningina. Seinasta ár var tímaløn mín undir 10 kr., so hetta er ein beinleiðis afturgongd í lønini, sum jú frammanundan er niðri í botni, sigur Jákup Eidesgaard.

→Nú hevur fólkaflokkurin umsitið búnaðarmál í landsstýrinum, men hevur hesin flokkur eisini eina týðandi støðu innan teir ymsu jarðarbróksstovnarnar?

— Menn við fólkaflokshúgsjón sita í teimum flestu av leiðandi størvunum innan føroyskt jarðarbrúk. Soleiðis hevur tað verið leingi. Her er bæði talan um Bóndafelagið, Búnaðarfelagið og um Jarðarráðið.

— Hetta er stovnar, sum skuldu arbeitt lið um lið fyri at fáa føroyska jarðarbrúkið upp á føtur og fingið ta likasælu, sum tingið yvirhøvur hevur vist jarðarbrúkinum, burtur.

— Hevði tað staðið øðrvísi til við føroyskum jarðarbrúki, um tað heldur enn fólkafloksmenn, vóru aðrir, sum umsótu hesi mál.

— Vit vita, at hyggja vit runt kring heimin, so fevnir høgrapolitikkur bert um tey fáu. »Fá skulu valda og njóta, restin skal gjalda og tróta«.

Í Føroyum er tað soleiðis, at ikki fyrr enn javnaðarfl. fekk fólk at lurta eftir sær, fyrr byrjaði ikki at koma gongd á nakað sum helst. Tað vóru jú høgrakreftirnar, sum stýrdu í Føroyum upp gjøgnum 50-árini.

Vit vóru tá afturútsigldir, meðan Danmark, Noreg og Svøriki høvdu sterkar javnaðarflokkar.

Ikki fyrr enn javnaðarfl. bleiv sterkur inni á tingi, kom gongd á, tí hinir tordu ikki at halda eftir meira.


Tað, sum okkum manglar er, at javnaðarfl. eins og hann framdi og stuðlaði fiskivinnumál, at hann nú samstundis tekur landbúnaðin við og fær gongd á hann.

— Um javnaðarfl. kemur aftur í landsstýrið, heldur tú tá, at teir eiga at kjósa sær landbúnaðarmálaráðharran?

— Ja, so avgjørt. Eg royndi at gera vart við hetta undir seinastu landsstýrissamráðingunum, men tað eydnaðist ikki. Eydnast tað heldur ikki hesa ferð mugu vit fara at vera meira virknir gjøgnum okkara tingmenn. Har er vissuliga nógv at fáa av skafti, endar Jákup Eidesgaard.

Tað er handilsfólkið sum stýrir landinum og ikki løgtingið

— *innflyta uttan fyrilit*



Vit spurdu nú Jákup Eidesgaard, um nøkur framtíð er í at hava slaktineyt og selja kjøtið á føroyska marknaðinum.

Jákup Eidesgaard:

— Til tað vil eg siga, at tað loysir seg als ikki. T.d. siggja vit, hvussu dýrt mjólkapulvurið, sum vit fóðra kálvar við, er vorðið. Ein kálvur kostar í reinum fóðri umleið 1200 kr. Tá so heystið kemur og tú skal selja hann — hann vigar tá 100 kilo — tá kanska tú fær 1400 kr. fyri hann.

— Men Jákup, heldur tú, at vit eiga at miðja í móti at hava eina munandi framleiðslu av slaktikjøti í Føroyum?

— Eg veit ikki, um tað er neyðugt. Tá eg var smádrongur var næstan ein kúgv uppá húsarhaldið. Siga vit nú, at vit skulu hava 10.000 mjólkikýr í Føroyum, vil tað siga, at millum 3.000 og 3.500 verða dripnar árliga. Einir 3.500 neytakroppar, sum fella frá mjólkaframleiðsluni, er nokkso fitt.

Men eta vit so meira kjøt enn tað, so ber altíð til at framleiða meira á plássum, har náttúran ger tað trupult at koma fram eftir mjólkini, og har tað er nokk av grasi, sum t.d. í Mykinesi og onkustaðni í Norðoyggjum. Har skuldu teir gjørt seg serliga út at hava slaktineyt.

Innflutt uttan fyrilit

— Hava vit tá onga sum helst tilrættalegging og stýring á búnaðarøkinum?

— Sannleikin er tann, at tað er ikki løgtingið sum stýrir landinum, tað er handilsfólkið. Tað verður jú innflutt uttan fyrilit. Reklaman er løgd upp soleiðis, at tú skal keypa, um tú hevur pengar ella ikki. Vit hava jú stórt undirskot á handilsjavnaðinum, og tá átti reklaman jú at verið bremsað eitt sindur fyri at minka um hetta undirskotið.

— Vit kundu í nógv størri mun verið sjálvbjargnir. Vit kundu verið komnir líka langt sum norðmenn eru í dag. Teir leggja tey best egnaðu gróðrarlendini av til ávikavist kornframleiðslu, mjólkframleiðslu o.s.fr.

Eingin politikkur

— Tú heldur, at norðmenn hava fört miðvísan politikk á búnaðarøkinum. Men hvussu við okkum føroyingum?

— Her er als eingin miðvísur politikkur. Eg meini at stigið til ein búnaðarpolitikk fyrst og fremst eigur at koma frá búnaðarfelagnum. Tað átti at farið til myndugleikarnar. Vist á skeivleikarnar og saman við myndugleikunum framt ein búnaðarpolitikk samstundis sum tingið tók seg saman og førdi ein miðvísan politikk — tó uttan at tað bleiv flokspolitikkur.

— Men er tú tá vónsvikin av tínum egna felag! Ger tað ov lítið við tykkara áhugamál?

— Avgjørt ov lítið. Skuldina av hesum hevur meirilutin í felagnum. Vit hava oftani sæð, at tingmenn koma til okkara. So eigur ikki at vera. Vit eiga at fara til teirra og vísa á skeivleikarnar.

Bert eitt mál

— Hevur tá landbúnaðarmálaráðharrin ikki gjørt nóg mikið við búnaðarmál?

— Vit hava ikki merkt so nógv til, at hann hevur fört nakran politikk á hesum øki. Hann hevur arbeitt við **einum** ávísum máli. Tað er royndarstøð og skúli. Og har eru vit als ikki samdir.

— Eg meti tað vera skeivt at leggja landbúnaðarskúla í Kollfjarðardali, sigur Jákup Eidesgaard og heldur fram:

— Vit eru í ferð við at uppbyggja eina nýggja vinnu — fiskaaling — og samstundis tosa vit um at gera royndarstøð og skúla til landbrúkið. Vit eru so smáir, at vit hava ikki ráð at skilja hesi økini sundur. Eg meini, at vit eiga at leggja bæði royndir og útbúgving á hesum báðum nær skyldu økjum saman. Her haldi eg, at Streymnesøkið hevði verið nógv best egnað til endamálið.

— Silahyljarnir liggja við Streymin, og klekistøð er við Áir. Haraftrat kemur at tað almenna eigur Saksunardal. Eisini eigur tað almenna hús á leiðini, har partur kundi verið brúktur til royndarstøð og skúla — til ein hevur funnið fram til, hvussu alt hetta best kann samskipast og gerast meira rationelt.

— Eg meti tað eisini so, at høvdu búnaðarmenn og fiskaalarar arbeitt saman, so hevði verið betri møguleiki at fingið pening til m.a. royndir.

Maskinur hjá lands landsverkfrøðinginum

— Vit eiga at velta so nógvan bø vit eru førir fyri — hetta eisini fyri at minka um undirskotið av at skula keypa hoyggj aðrastaðni.

— Nú játtanir til landsverkfrøðingin eru minkaðar skuldi verið lagamanni at fingið eina samskipan í lag um at brúkt maskinurnar hjá landsverkfrøðinginum — nú so nógvir privatir eru í gongd — til at velt við. So gjørdu tær nyttu ístaðin fyri at standa stillar — og tær eru sera væl egnaðar til velting.

Jákup sigur víðari, at tað er hansara hugsan, at føroyskir politikkarar kenna ov lítið til teir trupulleikar, sum jarðarbrúkarar hava at dragast við. Teir hava jú mett hesa vinnu so týdningarleysa fyri Føroyar.

— Vit tryggja okkum uppá allar møguligar mátar. Vit tekna livstrygging, tryggja bilar og hús, men vit tekna onga livstrygging til at vera sjálvbjargnir við mati í eini krepputíð. Tað er jú har, at landbúnaður og fiskaaling koma inn í myndina. Tí má eisini leggjast størri dentur á hesi mál heldur enn at byggja svimjihallir.

— Er tað nóg stórur áhugi millum tey ungu at fara í gongd við jarðarbrúk?

— Tað er tað so avgjørt. Teir ungu hava spurt okkum, sum nýliga eru byrjaðir, um góð ráð. Men vit kunnu ikki ráða teimum til at fara í gongd, tí vit sjálvir eru helst komnir út í óføri.